# Carola vann svenskt Melodi Grand-prix

**Leygarkvøldið vann Carola Häggkvist svenska melodi grandprixið fyri triðju fer. Og telefonnetið brendi saman, tá atkvøðast skuldi**

TÓNLEIKUR
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Favoritturin vann, tá Carola, við sanginum ”Evighet”, sang seg inn í stovurnar hjá svium leygarkvøldið. Fyrst á svenskum, og síðani á enskum, tá sigurin var greiður. Men tað var ikki bara sum at siga tað hjá 40 ára gomlu sangarinnuni, tí rødd hennara var burtur dagarnar undan stóri kappingini. So nógvar gitingar vóru millum fólk, um hon nú fór at klára at syngja seg upp á toppin.

– Hetta er veldugt fyri meg, og eg takki svenska fólkinum, segði Carola, tá tað gjørdist greitt, at sigurin var í hús.

Carola vann eisini svenskt melodi grand-prix í 1983 við ”Främling” og aftur í 1991 við sanginum ”Fångad av en stormvind”.

Men mitt í rokanum var ein, sum ikki var vinur sviia. Tað var Hans Hernborn, sum hevði ábyrgdina av atkvøðugreiðsluni.

– Tað vóru nærum tvær milliónir uppringingar, og tað sigur seg sjálvt, at tá so nógv ringja í senn, so rakar tað loftið á telenetinum onkrastaðni. So ljóðar telefonin upptikin ella eitt sperruljóð kemur. Men vit kunnu ikki eftirkanna, um hetta rakti okkurt lag oftari enn annað, siger Hans Hernborn, við svenska Aftonbladet.



*Carola Häggkvist aftur á toppinum*

# Útlendingur keypti fyri børn í rúsuni

**Ein útlendskur maður helt seg hava skotið pappageykin, tá hann seldi øl til unglingar**

*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Fríggjadagin um fýratíðina varð løgreglan boðsend niðan í Rúsuna í Havn. Har høvdu fólk varnast ein útlendskan mann, sum tóktiskt keypa øl til børn yngri enn 15 ár. Løgreglan fór á staðið og rætt var. Fimm ungir dreingir høvdu keypt øl frá manninum, sum sjálvsagt rýmdi, tá løgreglan nærkaðist. Løgreglan bar so í bandi, at dreingirnir fóru inn í rúsuna aftur við fløskunum og fingi peningin aftur. Síðani vórðu teir koyrdir heim til foreldrini, sum fingu eitt lítið prát við løgregluna. Maðurin, sum helst var úr Eystureuropa, hevur mestsum sæð ein møguleika fyri at forvinna sær nøkur oyru við at selja øl til óvitarnar.

## Náttarravnar nýggja nevnd

**Felagið Náttarravnar í Tórhavnar kommunu hevur havt aðalfund, og nýggj nevnd er vald**

Nevndin hevur síðan skipað seg: Ásvør Højgaard, formaður, Maiken Jacobsen, næstformaður, Ella Müller, kassameistari, Guðrið Rubeksen, skrivari, Arni Clementsen nevndarlimur.

Nýggja nevndin sigur, at hon heldur fram í góðum treysti við arbeiðinum at gera náttarlívið tryggari fyrst og fremst fyri okkara ungu.

– Og øll ábyrgdarfull vaksin fáa hervið eina áheitan um at koma út at ganga við okkum 2 – 4 túrar um árið. Tað er alt, ið skal til, fyri at gera býin tryggari.

# Bót til Bata opið hús oftari

**Kvinnur, sum hava fingið skurðviðgerð fyri krabbamein í bróstinum hittast annan hvønn mánað.**

SJÁLVHJÁLPARBÓLKUR
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Bót til bata, sum er sjálvhjálparbólkur fyri kvinnur, sum hava fingið skurðviðgerð fyri bróstkrabbamein, vil fegin røkka so nógvum kvinnum, sum til ber. Tí vónar bólkurin, at nógvar kvinnur fara at leita sær í hølini hjá Krabbameinsfelagnum á Grønlandsvegnum í Havn, nú tey fara at hava opið hús annan hvønn mánað. Kvinnurnar í bólkinum ásanna, at tað er ov lítið bert at skipa fyri tveimum hugnaløtum um árið, umframt at varpa ljós á bróstkrabba í oktober eins og onnur lond gera.

– Vit vilja røkka so nógvum kvinnum, sum hava verið undir skurði fyri bróstkrabba, sum til ber. Tí fara vit nú at hava opið hús regluliga. Endamálið er at hava eina hugnaliga løtu saman, har til ber at tosa, stuðla, hjálpa hvør aðrari og veita hjálp til sjálvhjálp, sigur Heidi Hvidbro, formaður í Bót til bata.

### Sjálvhjálparbólkur

Bót til bata er sjálvhjálparbólkur undir Føroya Felag móti Krabbameini. Bólkurin varð stovnaður í 1988 og hevur verið virkin síðan. Í bólkinum eru kvinnur, sum eru skurðviðgjørdar í brósti. Tær hava fingið upplæring í at veita stuðul, vegleiðing og ráð til aðrar kvinnur, ið skulu skurðviðgerast ella eru skurðviðgjørdar fyri krabbamein í brósti.

Sambært bólkinum verður opið hús í hølunum hjá Føroya Felag móti Krabbameini á Grønlandsvegi 58 í Havn mikukvøldið 29. mars 2006 kl. 19.00. Sagt verður, at tær, sum hava hug til at taka lut, skulu boða frá í seinasta lagi mikudagin 29.mars kl. 15.00 á telefon 317959, 217959 ella 217957, ella í telduposti: krabbamein@krabbamein.fo

## Fuglakrím í níggju dunnum á Ærø

**Talan er helst ikki um vandamikla H5N1 virusið**



Fuglakrím varð fríggjadagin staðfest í níggju deyðum dunnum, sum vórðu funnar á donsku oynni Ærø. Sambært tíðindum frá DR, er talan um H5 virusið, og danska matvørustýrið sigur, at talan er ikki um vandamikla H5N1 virusið.

Fyrivarni eru sett í gildi, har sjúkan er staðfest, eins og í síðstu viku, tá ein fuglur varð funnin við Næstved. Trygdarøkið, sum talan er um, er í sunnara parti av landinum: Ærø, Tåsinge, sunnari parti av Langeland, Drejø, Skarø, Strynø og sunnasti partur av Fjóni. Fólk í raktu økjunum verða áløgd at halda kettum innandura og at hava hundar í bandi, og annars at seta seg í samband við myndugleikarnar, um tey finna deyðar fuglar.

**rd**

## Tølini tala




**Talt&Hagreitt er heitið á nýggjasta tilboðnum frá Hagstovu Føroya**

HAGTØL
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Á heimasíðuni hjá Hagstovu Føroya verður greitt frá um nýggja tilboðið, sum fevnir um stuttar frágreiðingar um gongdina innan fiskiskap, uttanlandshandil, íbúgvar, tað almenna, kommunufíggjarskap, arbeiðsfjøld og tjóðarbúskap. Ætlanin er at viðgera fleiri evni, sum frá líður.

– Á síðunum ”Talt& Hagreitt” royna vit at nøkta tørvin á liðugt uppsettum hagtalsevnum í myndum og texti, uttan at flætta ov nógv tøl uppí. Hvørt evnið verður viðgjørt stutt og greitt, so frægt tølini loyva tí, og vit royna at taka fram nøkur týðandi fyribrigdi í hvørjum evni sær, siga tey av Hagstovuni.

– Frammanundan hava vit veitt eina – eftir okkara tykki frálíka – tænastu í Hagtalsgrunninum, har hvør og ein kann leita sær fram hagtøl í einum leitiamboð, sum er lætt at handfara. Men vansin er so tann, at har eru bara hagtøl – nógv hagtøl – og møguleikarnir at seta tey saman kunnu sýnast ørkymlandi, siga tey eisini á heimasíðuni hjá Hagstovu Føroya. Og tey greiða víðari frá, at tey hava staðfest ein tørv á liðugt taldum og hagreiddum tølum, sum kunnu geva eitt skjótt innlit í hvørt einstakt evni.

– Vit vóna at bæði skúlar, tíðindafólk, fyrisiting og øll onnur kunnu fáa gagn av hesari tænastuni, stendur at lesa á heimasíðuni, og sagt verður víðari, at,

– Onki er lýtaleyst og vit hava eisini ta vón, at vit kunnu fáa eitt aktivt samstarv við onnur um hesar síðurnar. Bæði sum viðmerkingar og rættleiðingar, men eisini sum veruligt samstarv um at gera fleiri og betri síður.

**rd**

## Stak friðarligt vikuskifti

Av politistøðini í Havn verður sagt, at vikuskiftið hevur verið framúr friðarligt. Løgreglan gjørdi ferðslukanningar í Havn fríggjadagin og vórðu 22 fráboðanir skrivaðar. Hesar snúðu seg einamest um, at fólk tosaðu í fartelefon meðan tey koyrdu og at nøkur høvdu gloymt koyrikortið eftir heima. Ferðsluátak var eisini í Kollafirði, og har vóru 21 bilar skrásettir fyri at koyra ov skjótt í bygdum øki, og hesir fáa allir bót. Ein bilur varð tikin fyri at koyra 98 km/t í bygdum øki, og stendur hann til eina treytaða fråkenning av koyrikortinum.

**Rd.**